

# Leys størv í Tórshavnar kommunu

## Skrivstovufólk til Fíggjardeildina

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Fíggjardeildina at seta skjótast møguligt.

Uppgávurnar eru fyrst og fremst innlesing (skanning) og avgreiðsla av inngangandi rokningum og røkt av kreditorum umframt aðrar vanligar bókhaldsuppgávur.

Tórshavnar kommuna er við í eini verkætlan við talgildum rokningum, har allar rokningar til kommununa verða talgildar. Ein av uppgávunum verður at vera við til at seta skipanina í verk.

Dentur verður lagdur á, at umsøkjarin dugir væl at samskifta bæði í skrift og talu. Kann arbeiða bæði sjávstøðugt og saman við øðrum, er álítandi og nærlagdur, hevur eitt jaligt sinni og góð samstarvsevnir.

Starvið er fulltíðarstarv og lønt í 3. flokki sambært sáttmála millum Starvsmanna-felagið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Fleiri upplýsingar fært tú við at ringja til Hera Olsen, fíggjarleiðara ella Tinu Johannesen fíggjarfulltrúa á telefon 30 20 10.

Umsókn við viðmælum og prógvum skal sendast til Tórshavnar kommunu, postboks 32, 100 Tórshavn, og vera okkum í hendi í seinasta lagi 20. mai 2009.

## Pedagogur til Dagstovnin í Øksnagerði

Søkt verður eftir einum pedagogi til Serstovu at arbeiða 30 tímar um vikuna at byrja 17. august 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Dagstovninum í Øksnagerði, Øksnagerði 1, 100 Tórshavn, í seinasta lagi mánadagin 25. mai 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jesper Roos Nielsen, leiðara, á telefon 30 22 60 / 21 99 59, ella til Anju Djurhuus, samskipara á serstovuni, á telefon 25 08 68. Ella á heimasíðu www.oksnagerdi.fo

## Pedagogur til Býlingshúsið á Ternuryggi

Søkt verður eftir einum pedagogi til vøggustovu at arbeiða 30 tímar at byrja 1. juni 2009 ella eftir nærri avtalu.

**Setanarviðurskifti**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelag Føroya.

**Umsóknir**
Umsóknir við avriti av prógvi og møguligum viðmælum skulu vera hjá Býlingshúsinum á Ternuryggi, Turiðargøta 5.A, 100 Tórshavn, í seinasta lagi fríggjadagin 15. mai 2009.

**Nærri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Marjun Hentze, stovnsleiðara, telefon 30 22 05 ella Anniku, pedagog, telefon 25 07 40.

**Tórshavnar kommuna**

---

HÓSKVØLDIÐ 14. MAI KL. 19.30

# EPILEPSI – TÁ HEILIVÁGURIN IKKI VIKRAR

## Á HOTEL HAFNIA

**Í sambandi við at 20 ár eru liðin, síðani Epileptikarafelag Føroya varð stovnað, verður ein fyrilestur um epilepsi-viðgerðir, við neurologinum Bjarka á Rógvi-Hansen og heilivágsfyritøkuni Eisai.**

**Fundurin er serliga ætlaður sjúklingum, avvarðandi, starvsfólkum og øðrum, ið eru áhugað í epilepsi.**

**Fundurin verður á Hotel Hafnia hóskvøldið 14. mai kl. 19.30-21.30.**

**Borðreitt verður við kaffi og køkum í steðginum.**

### SKRÁ:

**19.30-19.40:** Umboð fyri Epileptikarafelag Føroya bjóðar vælkomin og hugleiðir um 20 ára søgu felagsins.

**19.40-20.45:** Fyrilestur við Bjarka á Rógvi-Hansen, yvirlækna á Ríkissjúkrahúsinum, undir heitinum „Epilepsi – tá heilivágurin ikki virkar".
Nomið verður m.a. við hesar spurningar:
– Hvussu ofta kemur hetta fyri?
– Hvat kann orsøkin vera?
– Kann sjúklingurin bara steðga viðgerðini?
– Hvat verður gjørt í slíkum føri?

Aðrir viðgerðarmøguleikar verða eisini umrødd-ir, so sum skurðviðgerð, nýggjur heilivágur, nátúrheilivágur, kostviðgerð o.a.

**STEÐGUR**
Básur við tilfari til sjúklingar v/Jeanne Holby frá Eisai.

**21.15-21.30:** Høvi verður at seta spurningar.

**21.30:** Jeanne Holby frá Eisai tekur samanum.

Tiltakið er ókeypis, men tilmelding fer fram innan 13. mai kl. 12.00 hjá Randfríð Sørensen, Epileptikarafelagið, tlf. 263078 ella rs@inpact.fo.

Epileptikarafelag Føroya 1989-2009

**ØLL ERU HJARTALIGA VÆLKOMIN!**

TILTAKIÐ ER STUÐLAÐ AV EISAI

---